# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

HB 100 ár:

## Mest sigursvanda fótbóltslið í landinum

**Leygarkvøldið 23. oktober var so tann nógv umtalaða HB-veitslan í Ítróttarhøllini á Hálsi, her yvir túsund fólk vóru komin í 100 ára føðingardag hjá fótbóltsfelagnum**

HB-VEITSLAN
*Myndir: Niels J. Heinesen*



*Ein av trúgvu HB viðhaldsmonnunum, Øssur Gudmundsson, heldur røðu. Hann endaði sína røðu við at biða øll reisa seg og rópa eitt trífalt hurrá fyri HB*

Ein av størstu veitslunum, sum nakrantíð er hildin í Føroyum, var HB-veitslan seinasta leygarkvøld. Meira enn túsund fólk sótu til borðs, meðan røður og undirhald varð á pallinum. Rasmus Magnussen var orðstýrari.

Birgir Enghamar, formaður í HB, beyð teimum meira enn túsund fólkunum, sum vóru komin í 100 ára føðingardagin, at vera vælkomin.

Næsti røðari var Jóannes Eidesgaard løgmaður, hann segði m.a., at tað var honum ein heiður sum løgmaður og verji hjá ítróttininum at bera HB eina kvøðu hetta hátíðarkvøld, har fólk so mannsterk høvdu sett hvørjum øðrum stevnu at heilsa sínum ítróttarfelag.

»Tit kunnu í orðsins sanna týdningi frøast, nú HB er eina øld gamalt, og tit enn einaferð hava vunnið sum ongantíð fyrr. Vit eru mong, sum hava stóra virðing fyri HB. Hetta felagið, sum er tað mest sigursvanda í landinum, er tí gjarna altíð favorittur, og sum øll onnur feløg síggja ein serligan heiður í at vinna á, hóast tað sjáldan eydnast«, segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Í røðu síni segði Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, m.a. at tey fýra árini hann hevði verið borgarstjóri, hevði hann tríggjar ferðir verið við til et heiðra HB sum føroyameistarar. Síðan handaði hann HB ein kekk upp á 100.000 krónur frá Tórshavnar Býráð.

Eftir borgarstjóran hevði ein av trúgvu HB viðhaldsmonnunum, Øssur Gudmundsson, orðið. Hann endaði sína røðu við at biða øll reisa seg og rópa eitt trífalt hurrá fyri HB.

ÍSF forsetin Heðin Mortensen vísti í síni røðu á, at ein vinnarahugburður altíð hevði eyðkent HB og formaðurin í Fótbóltssambandinum, Óli Holm, segði, at HB hevði havt ómetaliga stóran týdning fyri føroyskan fótbólt sum heild.

Gestarøðari hetta kvøldið var Jógvan Fríðriksson, prestur. Hann helt eina sera undirhaldandi røðu og vísti m.a. á at fólbóltsfelagið í hansara sókn, Skála, hevði megnað at vunnið á HB í ár.

Eftir at røðurnar vóru hildnar, var undirhald á skránni við Jákupi Veyhe og Sjúrða Skaale, og brøðurnir Jógvan og Magni Arge, útvarpaðu ein fótbóltsdyst millum HB og Liverpool, har HB vann 2-1.

Eftir at borðhaldið endaði á midnátt, spældu Showmenn til dans.



*Birgir Enghamar, formaður í HB, og Sólbjørn Thomsen, formaður í HB-stuðlum*



*Anita og Jóannes Eidesgaard*



*Birgar og Elsa Johannessen. Birgar fann fram til sjálvan stovningardagin hjá HB*



*Brøðurnir Jógvan og Magni Arge, útvarpaðu ein fótbóltsdyst millum HB og Liverpool, har HB vann 2-1*



*Magnus Hansen við klaverið, Edvard Nyholm Debes og Rasmus Magnussen, sum var orðstýrari*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jógvan Leivur Nolsøe 50 ár



Í dag, 27. okt. 2004 hevur ein vælkendur klaksvíkingur/suðringur 50 ára føðingardag.

Talan er um Jógvan Leivur Nolsøe, Klaksvík. Jógvan Leivur, sum hann vanliga verður nevndur í dagligari talu, er sonur til Signhild Nolsøe úr Klaksvík, og Jóhan Nolsøe, sála, av Marknoyri í Vági.

Jógvan Leivur, ið tey seinastu mongu árini hevur arbeitt sum sølumaður fyri ymiskar handilfyritøkur í Føroyum, við onkrum undantaki, har hann hevur roynt sjólívið eisini, starvast í dag hjá P/f Damfar í Tórshavn og er uttan iva kendur av flest øllum handilsfólkum í Føroyum.

Í frítíðini er hjartabarnið hjá honum hondbóltsfelagið Stjørnan, har hann í fleri ár var málverji hjá 1. deildar mansliðnum, umframt at hann eisini varð ein av landsliðsmálverjunum, tá CHM hondbóltskappingini var hildin í Føroyum í 1980. Tey seinni árini hevur hann, saman við øðrum, verið ein av venjaranum hjá 1. deildarkvinnuliðnum hjá Stjørnuni og hava tey frálíku úrslitini talað fyri seg.

Føðingardagin er hann burturstaddur.

## Rósing Rasmussen 75 ár



*Rósing og Liss Rasmussen*

Í dag, mikudagin 27. oktober, verður Rósing Rasmussen í Runavík 75 ár. Hann hevði í mong ár bilsølu í Runavík, og nógvu tey seinastu árini hevur hann nýtt nógva tíð og orku at ferðast til Rumenia í sambandi við kristiligt hjálpararbeiði.

Rósing er ættaður úr Søldafirði. Foreldrini vóru Poulina og Per Rasmussen, Per uppi í Toft, sum bæði var bóndi og skipari. Tey bæði fingu tólv børn: Noomi (1919), Ester (1920), Anna (1921), Rasmus (1922), Noomi (1924), Inger (1925), Jafet (1927), Steinvør (1928), Rósing (1929), Bergliótt (1931), Sámal (1932) og Jafet (1940). Tann fyrra Noomi doyði ein mánað gomul, Anna doyði í 1953, Rasmus, sum var bóndi, doyði í 1992, Inger doyði í 1986, tann fyrri Jafet doyði í 1939 og Bergliótt ella Begg, sum hon varð nevnd, doyði í 1993. Noomi, Sámal og Jafet búgva í Søldarfirði, Ester býr í Danmark, Steinvør á Skála og Rósing í Runavík.

Føðingardagsbarnið var blaðungur, tá ið hann fór til Havnar at læra til bilsmið hjá Wensili Petersen. Seinni sigldi hann - bæði úti í stóru verð við gasstangabáti og sum motorpassari við fiskiskipi. Verfaðir hansara, Andrias Hansen í Túni á Toftum, keypti í fimmti árunum Eyðbjørg úr Vestmanna og gav henni navnið Mjóvanes. Jógvan Ingvard Olsen var skipari, og Rósing var motorpassari. Fyrsta túrin vóru teir í so ógvusligum ódnarveðri, at tað varð roknað við, at teir fóru ikki at bera boð í bý. Rósing hevur ofta tikið til hesa ferðina, og hvussu ovurfegin verfaðirin var, tá ið teir aftur høvdu vunnið upp land, og alt mansskapið var komið aftur í øllum góðum.

Tað var í bilsølu og veitingum í tí sambandinum, at Rósing útinti sítt lívsstarv. Pápi hansara hevði keypt eina barakk, tá ið bretarnir vóru farnir úr aftur Søldarfirði eftir kríggið. Í hesi barakkini fór Rósing at arbeiða upp á bilar. Fyrst í seksti árunum bygdi hann ein verkstaðsbygning á somu grund, og har umvældu teir bilar og seldu bensin.

Í fimmti árunum fór Rósing so smátt at selja bilar. Í fyrstu atløgu seldi hann bilar fyri Kissa Christiansen og Petur Háberg, sum áttu bilasøluna Norrønu. Eitt nú seldu teir Triumph og Standard bilar.

Seinni fór Rósing, sum var tiltikin sølumaður, sannur gentlimaður og føddur optimistur, at selja fyri seg sjálvan. Hesin parturin av fyritøkuni hjá honum helt til í Runavík. Bilmerkini, sum hann bjóðaði fram, vóru eitt nú Studebaker, IH (International Harvester), Simca, Skoda og Saab. Í 1963 gjørdist Rósing umboðsmaður fyri Toyota, og í 1966 løgdust Scania bilarnir afturat. Hetta var júst um tað mundið, tá ið ferð kom á útbyggingarnar av samferðslukervinum, og tá ið alt fleiri føroyingar fóru at fáa sær privatbilar. Rósing seldi Scania lastbilar til teir, sum eitt nú arbeiddu í tunnlum, havnum og vegum, og Toyota bilar til privata nýtslu og hýruvognar.

Í sjeyti árunum seldi hann heilt fitt av Scania bussum, og tá var tað, at Rósing eisini fór undir so at siga at útgera lastbilar eftir tørvinum hjá teimum, sum keyptu. Tað gjørdi hann í Gøtu, har hann meiri ella minni hevði bilverksmiðju, um tað ber til at siga tað soleiðis.

Talið á bilum, sum Rósing seldi frá bilsøluni í Runavík og eisini í Havnini, var væl omanfyri túsund, áðrenn hann gavst við hesum í 1980. Tá hevði hann havt heilt nógv fólk í arbeiði.

Í áttati árunum var Rósing í fleiri ár vitapassari á Hirshólminum nakað uttanfyri Frederikshavn. Har var hann saman við fleiri úr familjuni, sum eisini arbeiddu har um hetta mundið.

Rósing giftist í 1951 við Liss, sum er ættað uttan av Toftum. Tey búsettust við Løkin í Runavík, og tey fingu seks børn: Anna (1953), Bogi (1958), Beinta (1960), Ingun (1962), Rógvi (1963) og Gudny (1967). Anna býr í Keypmannahavn, Bogi, Ingun, Rógvi og Gudny í Runavík og Beinta í Havnini. Abbabørnini eru tjúgu og langabbabørnini fýra.

Liss og Rósing hava havt eitt gott heim, har gestablídnið hevur verið stórt. Tey hava verið drúgv og trúgv í Berøa í Saltangará.

Síðani tey gjørdust pensionistar hava tey bæði ikki ligið á løtu síðuni. Nú munnu tað vera eini 12 ár síðani, at Rósing fyrstu ferð fór eystureftir í hjálparveitingarørindum. Síðani tá hevur hann saman við øðrum verið óteljandi ferðir í Rumenia, og Liss hevur ofta verið saman við honum. Teinurin aftur og fram er hvørja ferðina 6-7 túsund kilometrar, men tað er ikki nakar trupulleiki. Ferðirnar tykjast at vera balsam fyri bæði likam og sál hjá teimum báðum, og felagsskapurin millum tey, sum luttaka á hesum ferðunum, er ógvuliga góður. Tey hava hitt eina rúgvu av fólki eystanfyri, og vinaskarðin er nógv øktur. Bæði eru tey góð frásøgufólk, og tá ið tey tosa um og greiða frá ferðunum til og umstøðunum í Rumenia, lívgast tey rættuliga upp. Myndin av teimum báðum er tikin á einari av mongu ferðunum í Rumenia.

75 ára føðingardagurin verður hildin í kappróðrarneystinum á Glyvrum, har tað verður opið hús frá klokkan fýra seinnapartin í dag.

## Nýggjur stjóri settur í Suðuroyar Sparikassa

**Nevndin í Suðuroyar Sparikassa avgjørdi á fundi fríggjadagin í seinastu viku at seta Søren Lünell Bruhn sum nýggjan stjóra í Suðuroyar Sparikassa**



Søren Lünell Bruhn er 30 ára gamal. Hann er føddur og uppvaksin í Struer í Danmark, har hann tók studentsprógv í 1993. Søren Lünell Bruhn varð cand. polit við Keypmannarhavnar Universitet í 2000. Síðan hevur hann tikið útbúgvingina Master of Manegment á Robert Gordon Universety í Aberdeen.

Søren Lünell Bruhn hevur góðar royndir í sínum yrki sum búskaparfrøðingur. Hann hevur starvast sum fulltrúi í bæði danska og føroyska fíggjarmálaráðnum, og hevur harafturat starvast eitt skifti í danska Kappingarráðnum.

Søren Lünell Bruhn gjørdist í 2003 fíggjarleiðari á Almannastovuni í Føroyum, og er hann tí væl kunnaður um føroysk viðurskifti.

Søren Lünell Bruhn er búsitandi á Tvøroyri, haðani konan Rudi Nielsen er frá. Saman eiga tey ein son.

Søren Lünell Bruhn byrjar at arbeiða í Suðuroyar Sparikassa 1. desember í ár og tekur við sum stjóri 1. januar 2005, tá Mikkjal Sørensen verandi stjóri í Suðuroyar Sparikassa fer úr starvi.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá góði maður, pápi, abbi og langabbi okkara

**Einar Jóhan Mortensen**
**Klaksvík**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri troystarrík orð í kapellinum og í Betesda og á grøvini og til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.
Tøkk fyri blómur og kransar og til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

**Káta, Hergerð, Anna Maria, Ása, Eydna, Marjun, Páll við familjum**

## Dagurin

**27. oktober. Sem.** Hann var elsti sonur Nóa og var ættarfaðir at semitisku fólkasløgunum.
Navnið er hebráiskt og merkir *sonur* ella *arvingi*.